## VESTMANNA KOMMUNA

Bakkavegur 16 | Postboks 91 | 350 Vestmanna

# VARALEIÐARI TIL LÁTIPÍPUNA

Søkt verður eftir avloysara fyri varaleiðaran í Látipípuni, at byrja skjótast til ber og arbeiða fram til 15. august 2009. Talan kann vera um niðursetta arbeiðstíð. Um eingin námsfrøðingurin søkir, verður hjálparfólk sett í starvið.

Stovnurin fevnir um útibarnagarð og frítíðarstovu. Varaleiðarin samstarvar við leiðaran um at leggja dagliga arbeiðið á stovninum til rættis, og at seta mál fyri stovnin, umframt aðrar uppgávur.

**Vit vænta, at:**
- tú hevur leiðaraevni
- tú dugir at seta mál fyri stovnin
- tú ert áhugað/-ur í at menna útibarnagarðin og frítíðarstovuna
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur góð samstarvsevnir
- tú megnar at at tryggja eitt greitt og jaligt samskifti á stovninum

**Vit kunnu bjóða:**
- ein grønan stovn í náttúruumhvørvi við góðum møguleikum fyri túrum í á, haga og fjøru
- ein stovn, har dentur verður lagdur á alla tíðina at menna arbeiðið við børnunum
- ein starvsfólkabólk, sum er opin fyri nýggjum avbjóðingum

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Núverandi setanarstaður er Látipípan. Setanarøkið er dagstovnaøkið í Vestmanna Kommunu.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Vestmanna Kommunu á tlf. 470 110.

Skrivlig umsókn við avritum av prógvum og viðmælum skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2008 kl. 12.00.

---

**Látipípan** er ein stovnur við útbarnagarði til 5-7 ára gomul børn og frítíðarstovu til børn í 1.-2. flokki.

Frítíðarstovan er inni á Fjørð – tætt við Fossá, fjøruna og sandin.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum fjølbroyttar upplivingar saman við javnaldrum, og at læra tey at virða hvønn annan.

Útibarnagarðurin er í Miðalsbrekku í vøkrum náttúruumhvørvi millum Hórðará og Gjógvará – tætt við hagan.

Dentur verður lagdur á at geva børnunum upplivingar úti í náttúruni, og at búgva tey til at fara í skúla.

## Ársaðalfundur

Pensionistafelagið í Havn hevur ársaðalfund í Losjuni, Tinghúsvegi 18, **mikukvøldið 22. oktober 2008 kl. 19.00.** Dagsskrá sambært §11 í lógum felagsins.

**Nevndin**

## Skeið um strongd

**verður fríggjadagin 17. oktober 2008, kl. 9.00-16.00 í Havn**

Broytingar hava nýggjar mannagongdir við sær. Tað er neyðugt at venja seg við nýggjar arbeiðsgongdir, nýggjar starvsfelagar, nýggj fyristøðufólk, samstundis við at tú skalt læra teir broyttu karmarnar at kenna. Tað slítur upp á orkuna, og tað kann hava við sær, at tú gerst útmøddur!

Tað hevur týdning at fáa yvirlit yvir og tamarhald á nýggju støðuni so skjótt sum møguligt fyri at finna javnvágina og trivnaðin aftur. Um tú forsømir hetta, kunnu lættliga koma støður við strongd, innvortis óró og sjúkrafráveru.

Á skeiðinum verður dentur lagdur á, hvørji tekin tú skal hava eyguni eftir – bæði hjá tær sjálvum og tínum starvsfeløgum fyri ikki at gerst illa staddur av strongd!

Harumframt verður dentur lagdur á mannagongdir til at endurfinna ella halda uppi javnvágini bæði hjá tí einstaka eins og í bólkinum.

**Leiðarorð:**
- Strongd – orsakir, eyðkenni og virkisætlanir
- Sálarligt arbeiðsumhvørvi – samstarv, samskifti og strongdarvaldar
- Trivnaður – yvirlit, tamarhald, gleði og hugur

Skeiðið vendir sær til starvsfólk og fyristøðufólk.

Skeiðið fer fram á donskum máli.

**Undirvísari:**
Jeanett Bonnichsen, sálarfrøðingur, rithøvundur og stjóri í Center for Stress og Trivsel A/S

**Prísur:** 1.600 kr. íroknað kostarhald

**Tilmelding:** cfs@cfs.dk ella 0045-3314 4020 (gerandisdagar 9.00-15.00)

**www.center-for-stress.dk**

center for stress og trivsel

Vi tager folk alvorligt


# ALT TIMBUR OG SNIKKARAARBEIÐI verður gjørt



**So sum:**
Nýbyggjan
Tilbygging
Umvælingar
Teking
Skifta vindeygu
Klæða hús

Óbindandi tilboð verða givin
**Ring á 58 66 66**

# J. P. TRÆSMÍÐ


## Starv

Søkt verður eftir einum framfýsnum fólki til leksiuhjálp til næmingar í Vágs- og Porkeris kommunu

Vit ynskja, at tann, ið skal setast, hevur læraraútbúgving ella líknandi førleika, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt og hava góðar samstarvseginleikar.

Arbeiðið er 15 tímar um vikuna og verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og avvarðandi fakfelag.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Annu Djurhuus, leiðara á Sosialu Deild tlf. 37 36 04, ella til Sakaris Dimon, samskipara á NSR Suður tlf. 238771 ella t-post sakaris@nsrsudur.fo

Umsóknin við prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til Sosialu Deild att.: Anna Djurhuus í seinasta lagi **17. oktober 2008 kl 12.**

**Sosiala Deild**
**Porkeris Kommuna** **Vágs kommuna**
Við Á 8
950 Porkeri
Tlf 37 36 04
Tlf 22 67 04
Fax 37 46 03
T-post: sosialadeild@email.fo

## KUNNGERÐ

Hervið verður kunngjørt, at Sumbiar kommuna á kommunustýrisfundi tann **29. september 2008** hevur samtykt at broyta verandi byggisamtykt fyri Lopra.

Talan er um at broyta matr.nr. 252a í Lopransdali, frá landbúnaðar- til sethúsaendamál.

Ætlaða broytingin verður løgd fram til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni til **23. oktober 2008.**

Møgulig mótmæli og broytingaruppskot til uppskotið til byggisamtykt, skulu vera kommunustýrinum í hendi áðrenn 3 mánaðir eru gingnir frá 2. oktober 2008 at rokna.

*Sumbiar Kommuna, tann 2. oktober 2008*

**SUMBIAR KOMMUNA**
FO-970 SUMBA
Telefon 370344 Fax 370114


# Sosialin

-so eru tit við!